**Röða**
**forseta Íslands**
**Guðna Th. Jóhannessonar**
**í móttöku**
**á Föroya Lögtingi**
**Tórshavn**
**17. mai 2017**

Föroya Lögting.
Lögtingsformaður.
Virðiligu lögtingsmenn!

Eg beri tykkum og föroyingum öllum kvöðu frá íslendingum, vinatjóð tykkara. Eg takki fyri heiðurin at flyta fram röðu fyri tykkum, fremstu fulltrúum föroysku tjóðarinnar, her á fyrndargamla tingi föroyinga, ið runnið er av somu rót, sum Alting okkara. Vegna mín og Elizu, konu mínar, takki eg inniliga fyri tað góða hjartalag, okkum hevur verið sýnt her í Föroyum á fyrstu vitjan okkara higar, eftir at eg tók við forsetaembætinum. Hvaðar vit okkum venda, mötir okkum góðvild og blíðskapur.

Ikki kemur tað óvart á. Millum Föroya og Íslands liggur sama æðralag. Fyri stuttum savnaðu íslendingar inn pening til at styrkja virksemina hjá bjargingarfelögum í Föroyum, eftir at herviligt ódnarveður rakti tykkum á jólum í fjör, og væl minnast vit, hvussu skjótt föroyskir myndugleikar ráddu av, tá ið djúp bankakreppa rakti Ísland um heystið 2008. Lán var okkum veitt uttan drál, uttan treytir og við góðynski um, at brátt fór aftur fyri okkum at blíðka.

Kæru vinir! Vit eru fámentar tjóðir, íslendingar og föroyingar, her úti á víðum Atlantshavi. Ikki ráða vit fyri vælferð annara tjóða, og lítið fáa vit gjört til at broyta sögugongdina hjá mannaættini. Tó eiga vit at gera okkara ítarsta, og um ikki annað kunnu vit verða öðrum tjóðum til fyrimyndar – og standa saman!

Havið skilur okkum sundur og sameinir okkum. Í hálvaaðru öld hava föroyingar troytt íslandsmið, og föroyingar í hópatali hava siglt við íslendskum skipum, nógv eftirspurdir fyri dugnaskap og treyst. Í samráðingum um býti av felags fiskastovnum í Atlantshavi hava íslendingar borið virðing fyri bersögni og sanndömi föroyinga. Báðar tjóðir hava egin áhugamál at verja, men duga kortini ta list at gera neyðsemjur. Vit vita av ringum royndum, at óavmarkað sjálvsökni skaðar allar partar.

Annað vita vit eisini: hövini mugu verjast, og vit verða at berjast ímóti dálking og mongum váða, sum havið er í av mannaávum í okkara tíð. Á hesum vígvölli er alneyðugt, at vit íslendingar og föroyingar halda saman og fáa aðrar tjóðir at skilja, hvussu vandamikið plast og onnur óhumska eru fyri havsins vistfröðiskipan, tí tað liggur alt longu og rekst um öll heimsins höv. Vit mugu duga á at skyna, hvat firðir og sund okkara tola av alibrúki, at ikki morgungleðin glatast á kvöldsins grill.

Soleiðis roynist, at um enn fátt og smátt er her í atlantshavsoyggjum, verður lurtað eftir okkum, tá vit tala um tað, sum vit kenna best – og er tað nakað, vit hava skil fyri, er tað havinum, eyði tess og óttanum, sum vit ervdu feðrum frá.

Tjúkt er fyri framman, men tað blíðkar fyri hugaðum monnum. Í so máta er ikki annað fyri hjá föroyingum enn at trimma stimin í toppin. Síðsta mánað frættist í Íslandi, at fólkatalið í Föroyum var gingið upp um 50.000 á fyrsta sinni nakrantíð - tað grör um gangandi fót!

Í Íslandi fylgja öll við í, hvat fer fram í Föroyum - við hjarta og sál. Föroyingar siga sögn um íslendinga, at teir sendu tvey tröll til Föroya at draga landið til Íslands. Tey hövdu bara ta einu náttina, tí ikki toldu tey dagsins ljós; men tey undirmettu setningin. Tí standa elstu íslendingar í Föroyum enn sum steintröll, Föroyar fara ongan veg! Tindtempul höga! Sögu hava tit ríka, og eigi tit góðan byr fram á leið. Í heimshöpi hava vit ikki staðið aftastir, tó at vit vita um mótburð at siga. Vit hava litið á egnan mátt og megi, eins væl og samvinnu við aðrar á mongum ökjum. Áralagið er gott, og vit íslendingar rógva heilhugaðir saman við tykkum föroyingum. Eitt hitt besta dömið er Útnorðurráðið, har grannar okkara fyri vestan, grönlendingar, eisini sita við árar.

Kæru grannar í Föroyum, lögtingsformaður og lögtingsmenn! Eg takki tykkum enn eina ferð og biði alt gott standa tykkum hjá. Hjá tykkum er altíð gott at vera, her býr tann tjóð, vit kenna best – vinir, sum roynast í harmi og gleði.